


# Vælkomin á bátafestival

*Flaggdagurin 25. apríl hevur júst verið, og minnir hann okkum á, at summar er í hondum. Tað er nú, at stevnurnar byrja runt landið. Tann fyrsta árliga stevnan hevur nú í fleiri ár verið bátafestivalurin á Toftum, sum liggur fyrsta vikuskiftið í mai. Bátafelagið á Toftum hevur hesi seinastu árini ment hetta tiltakið til veruliga at vera ein festivalur, sum er afturvendandi hvørt ár, og sum fólk tosar um og gleðir seg til.*

*Aftur í ár hevur festivalurin eina fjølbroytta skrá fyri bæði børn og vaksin. Fleiri kend nøvn eru við, sum fara at undirhalda í stóra teltinum. Umstøðurnar hjá bátum og kampingvognum eru í top, so tað er at seta kós - og seta hvørjum øðrum stevnu á bátafestivalinum hin 7. mai. Vælkomin til Toftir leygardagin!*

***Símin Johannesen***
***Borgarstjóri***



*– Øll eru vælkomin til Toftir leygardagin til bátafestival, sigur borgarstjórin, Símun Johannesen, borgarstjóri*

# So byrja bátastevnurnar aftur

**Ársins fyrsta bátastevna er stevnan, sum Bátafelagið á Toftum skipar fyri. Leygardagin verður siglt úr Skálafirði og út í Oyrarnar á Toftum**

Vilmund Jacobsen

Skal siglast, má loysast. So einfalt er tað.

Leygardagin verður so ársins fyrsta bátastevna. Fyrireikingarnar eru í hæddini, og á Toftum verður vónað, at undirtøkan fyri regattasiglingini úr Skálafirði og út í Oyrarnar á Toftum verður stór – og helst enn størri enn undanfarin ár.

Seinnu árini hevur tað vundið meiri og meiri upp á seg at sigla og njóta frítíðina í báti. Heilar familjur kunnu vera í summum bátum, og í øðrum bátum eru tað vinfólk, sum sigla og hugna sær saman.



Eitt annað mynstur, sum vit eisini hava sæð vinda upp á seg seinnu árini, er, at fólk eru farin at ferðast meiri í húsvognum, eins og tað eisini er vorðið vanligt at tjalda á stevnum og festivalum.

Tað er hugnaligt at vera millum tey sum sigla, og við bryggjukantin og eins og umborð á bátunum verður matgjørt, spælt og sungið, tá lagið er best.

Nú er bert at vóna, at veðurgudarnir halda seg í skinninum leygardagin. Gera teir tað, er lítil ivi um, at bátasiglarar og stevnugestir annars fáa eina góða bátastevnu leygardagin.

*vilmund@sosialurin.fo*